# Ríðihøllin hjá Berg Hestum reist

**Tíðliga í summar stendur ríðihøllin hjá Berg Hestum klár at taka í nýtslu**

BYGNINGUR
*Turið Kjølbro*

Stóra ríðihøllin hjá Leif Berg og Berg Hestum er nú reist. Høllin liggur undir oyggjarvegnum í Havn, fáar metrar frá vallaraheiminum hjá Smyril-Line. Talan er um eina stóra ríðihøll og fjós til 30 ross. Bygningurin er 33 metrar langur og 24 metrar breiður. Uttan fyri er pláss til rossini at ganga. Økið, har bygningurin stendur, er leigað frá Tórshavnar býráð, í alt 17.000 fermetrar.

Ríðihøllin er ein gamal dreymur hjá Leif Berg.

– Eg byrjaði at arbeiða við hugskotinum um eina ríðihøll í 1985 og hevði ætlanir um at byggja hana aðra staðni, men kreppa og annað steðgaðu teirri ætlanini, greiðir Leif Berg frá.

Ríðing fyri brekað verður grundarlagið undir rakstrinum av nýggju høllini.

– Eg havi nóg mikið av gera við heimamarknaðinum, hesin parturin økist í hvørjum, sigur Leif Berg

Umframt ríðingina fyri brekað er ætlanin, at ferðavinnan og ríðiskúlin skulu geva eitt avkast.

– Tá ið høllin er tikin í nýtslu, er ætlanin at skipa ein ríðiskúla. Tað verður kortini ikki sum aðra staðni, har næmingar koma regluliga til undirvísing í ríðing. Aðra staðni fáa ríðiskúlar almennan stuðul, so er ikki her og tí ber ikki til at skipa ríðiskúla er slíkum leisti. Vit verða noydd at skipa skúlan øðrvísi, sigur Leif Berg.

Leif Berg hevur í nógv ár skipað fyri ríðing fyri brekað, og í dag ganga eini 30 børn til ríðing umframt onnur brekað frá ymsum stovnum. Upprunaliga var ætlanin, at ferðavinnan skuldi eiga ein størri leiklut í nýggju ríðihøllini, eitt nú við ríðistovu, har ferðafólk eisini kundu gista. Henda ætlanin er slept orsakað av vantandi stuðli frá ferðavinnuni sjálvari.

Berg Hestar eiga 20 ross, írestandi tíggju básarnir verða leigaðir út. Í løtuni arbeiða trý fólk hjá Berg Hestum.

Ríðihøllin er mett at kosta 2,4 mió. krónur, men av tí at mest sum øll høllin er gjørd við sjálvbodnari arbeiðsmegi og tilfari, Leif Berg sjálvur hevur flutt inn, fer høllin at standa í umleið 750.000 krónur, tá ið hon er liðug. Høllin hevur fingið stuðul frá Grunni Ferðavinnunnar, svarandi til 20 prosent av 50 prosentum av allari íløguni.

Gongst sum ætlað verður høllin tikin í nýtslu 1. juni, og tá flytir alt virksemið hjá Berg Hestum, sum nú er við Marknagilsvegin, niðan undir oyggjavegin.



*Í summar flytir alt virksemið hjá Berg Hestum við Marknagilsvegin niðan undir oyggjavegin, har stóra ríðihøllin verður bygd.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Filmur um ull og ullarvirking

**Føroya Heimavirkisfelag ger film um, hvussu ull verður virkað í Føroyum**

FILMUR
*Turið Kjølbro*

At varðveita gamlar heimavirkissiðir er eitt endamál hjá Føroya Heimavirkisfelag. Tí hevur felagið tikið stig til at gera ein film um føroyska siðvenju innan ull og ullarvirking saman við Nicolinu J. Beder, handarbeiðslærara, stendur at lesa í blaðnum hjá Føroya Heimavirkisfelag. Arbeitt hevur verið við hesi verkætlan síðani 1999. Árni Conradsson og Zacharis Hammer framleiða filmin, sum verður stuðlaður bæði alment og privat.

Tónleikin til filmin hevur Martin Joensen gjørt, og Ívar Iversen, fyrrverandi útvarpsmaður, lesur tann siðsøguliga partin.

Øll arbeiðsgongdin í sambandi við ullarvirking verður lýst í filminum. Byrjað verður á várgongu, tá ið seyðurin verður royttur og ullin vaskað, og endað verður við tógvroyndum og lidnum pløggum.

Upptøkur eru gjørdar í roykstovuni í Hoyvíksgarði og í Dúvugørðum. Filmurin, sum er slakar tveir tímar langur, er ætlaður sum frálærutilfar, men er avgjørt áhugaverdur hjá øllum, ið hava áhuga fyri eldri mentan. Filmurin kemur út 28. mai, sjálvan stovningardagin hjá Føroya Heimavirkisfelag, ið hevur 15 ár á baki í ár.



*Nicolina J. Beder spinnur á lítlastrá*

# Heimavirkisfelagið flutt í telduøldina

**www.craft.fo er heimasíðan hjá føroyskum listhandverkarum og heimavirkisfólki**

HEIMAVIRKI
*Turið Kjølbro*

At virka lutir heima, antin tað er úr ull, viði ella øðrum, er framvegis ein livandi táttur í lívi føroyinga. Hesi fylkjast í Føroya Heimavirkisfelag, sum eftir øllum at døma er eitt virkið felag við tveimum blaðútgávum á hvørjum ári, stóru summarsølustevnuni Hendur&Hugflog og jólasølustevnuni í Badmintonhøllini. Umframt er felagið í holt við at gera ein film um føroyska siðvenju innan ull og ullarvirking, og sum tað seinasta hevur felagið gjørt eina heimasíðu www.craft.fo. Inni á hesi heimasíðuni ber til at fáa allar upplýsingar um Føroya Heimavirkisfelag, nevnd, og hvussu ein gerst limur. Eisini er tilfar um stóru summarsølustevnuna, sum altíð verður væl vitjað.

Sum er hava trý listafólk heimasíðu hjá á www.craft.fo. Allir heimahandverkarar og heimavirkisfólk kunna fáa egna heimasíðu inni á hesi somu heimasíðuni, stendur at lesa í blaðnum hjá Føroya Heimavirkisfelag, sum júst er komið. Ein ensk útgáva av heimasíðuni kemur eisini. Menningarstovan hevur ábyrgdina av heimasíðuni og hevur fingið fyritøkuna Gramar at umsita hana.

Føroya Heimavirkisfelag varð stovnað 28. mai 1986. Endamál felagsins er at stuðla øllum heimavirkisáhugaðum og vekja áhuga hjá fólki at virka dygdarlutir, ið lúka nútíðarkrøv og at varðveita gamlar heimavirkissiðir. Føroya Heimavirkisfelag varð stovnað av 28 kvinnum og í dag eru 333 limir skrásettir, konufólk og mannfólk.




*www.craft.fo*





*Sambandsflokkurin vil nýskipan. Greitt valds- og ábyrgdarbýti skal gerast við danir, og løgtingið skal hava evsta vald í yvirtiknum málum. Hetta er høvuðsboðskapurin frá landsfundi Sambandsfloksins*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsfundur Sambandsfloksins:

# Føroyar skulu hava evsta vald

**Sambandsflokkurin mælir til, at føroyingar fara at samráðast við danir um eina nýggja skipan millum londini við greiðum valds- og ábyrgdarbýti, sum greitt gevur Føroya Løgtingi evsta vald í yvirtiknum málum**

FUNDARSAMTYKT
*John Johannessen*

Broytingar skulu gerast á ríkisrættarliga økinum, soleiðis at Føroyar fáa evsta vald í yvirtiknum málum.

Hesa niðurstøðu samdist landsfundurin hjá Sambandsflokkinum um leygardagin.

Men hetta merkir kortini ikki, at Sambandsflokkurin tekur undir við nýggju sjálvstýrisætlanini hjá landsstýrinum.

– Landsfundur Sambandsfloksins mælir samgonguni til í stundini at sleppa síni endurskoðaðu loysingarætlan, sum hevur til endamáls at lirka skaðiligar politiskar avgerðir ígjøgnum uttan um fólksins vilja, sigur Sambandsflokkurin í fundarniðurstøðu síni.

## Greitt býti

Sambandsflokkurin heldur, at samgongan í staðin eigur at viðurkenna tann óreingiliga veruleika, at Føroya fólk ikki tekur undir við fullveldisætlanini. Og út frá hesi sannroynd heldur Sambandsflokkurin, at politiska kósin eigur at verða broytt.

– Landsfundurin mælir til, at samráðingar verða tiknar upp við ríkisstjórnina um eina nýggja skipan millum londini við greiðum valds- og ábyrgdarbýti, sum greitt gevur Føroya Løgtingi evsta vald í yvirtiknum málum, sigur Sambandsflokkurin í niðurstøðuni frá landsfundinum.

Í hesum sambandi vísir Sambandsflokkurin á nýskipanaruppskot sítt frá 1999. Hetta uppskot heldur flokkurin vera besta amboð í samráðingunum fram ímóti meira sjálvbjargnum Føroyum, har vælferðarsamfelagið verður ment og varðveitt, og har komandi ættarlið fáa fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi.

– Hendan skipan gevur føroyingum møguleikar fyri reellum sjálvstýri í Føroyum, sum verður ment og útbygt í samsvari við okkara umstingarligu og fíggjarligu førleikar.

– Hendan skipan gevur eisini tí einstaka føroyinginum størri persónligt frælsi, enn ein skipan við fullveldi kann geva, sigur Sambandsflokkurin.

## Broyttur flokkur

– Eitt nýtt andlit í formanssessinum kann møguliga betra um umdømið hjá flokkinum, so vit ikki longur verða sett í bás, sum tey, sum einki vilja.

Soleiðis segði Lisbeth L. Petersen við Sosialin áðrenn formansvalið í Sambandsflokkinum, sum Lisbeth vann.

Lisbeth L. Petersen vil vera eitt nýtt andlit í Sambandsflokkinum, soleiðis at flokkurin ikki longur verður kendur, sum ein stirvin og afturhaldssinnaður flokkur. Nýggja forkvinnan ætlar sær at vera léttari at tosa við, tá tað snýr seg um broytingar í ríkisrættarligu støðuni. Men ríkisfelagsskapurin er markið.

Fundarniðurstøðan frá landsfundinum hjá Sambandsflokkinum bendir á, at Sambandsflokkurin hevur førkað seg nærri móti teimum, sum ynskja ítøkiligar broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum. Í øllum førum benda útsagnirnar á, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin nú liggja rættuliga tættir í hesum máli.

# Schengen virkar væl




*Føroyingarnir, sum komu við Atlantsflog úr Aberdeen sunnukvøldið, noyddust at vísa pass, tá teir komu í land í Vágum. Hetta er ein avleiðing av, at Føroyar eru farnar upp í Schengen samstarvið*
*Mynd: John Johannessen*

**Løgreglan á flogvøllinum letur væl at nýggju passeftirlitsskipanini, sum er komin í sambandi við, at Føroyar hava gjørt av at vera við í Schengen samstarvinum**

PASSEFTIRLIT
*John Johannessen*

Øll ferðafólk við flogrutuni hjá Atlantsflog úr Aberdeen skulu vísa pass, tá tey koma í land á flogvøllinum í Vágum.

Hetta er ein av avleiðingunum av, at Føroyar eru farnar upp í Schengen samstarvið.

Í Schengen samstarvinum er ein passeftirlitsskipan, sum kallast SIS skipanin ella Schengen Information System. Hetta er ein telduskipan, sum øll londini í Schengen samstarvinum eru knýtt at. Og í hesi telduskipan verða fólk skrásett, sum hava framt brotsverk ella eru útvíst úr einum landi.

Hendan telduskipan er eisini sett upp í passeftirlitsbúrinum á flogvøllinum í Vágum.

Øll londini, sum Føroyar hava flogsamband við, uttan Stóra Bretland eru við í passskipanini í Schengen samstarvinum. Tí er ikki neyðugt við passeftirliti, tá flogførini úr Danmark, Íslandi og Noreg lenda í Vágum.

Men tá flogfarið hjá Atlantsflog setir seg í Vágum, krevur Schengen skipanin neyvt passeftirlit. Øll skulu kannast - eisini føroyingarnir.

Sosialurin var á flogvøllinum, tá flogfarið hjá Atlantsflog kom úr Aberdeen sunnukvøldið. Tá vóru bert føroyingar við, og tí var einans neyðugt at vísa løgregluni passini, so tey kundu eyðmerkjast.

Men mánadagin stóð skipanin sína roynd. Tá var eitt ferðafólk úr Ný Sælandi við í flogfarinum úr Aberdeen. Hesin var noyddur at lata løgregluni passið, so løgreglan kundi kannað efir í telduskipanini, um talan var um ein, sum hevði forbrotið seg ella var útvístur úr einum Schengen landi. Løgreglan kannaði passnummarið í SIS dátugrunninum, men kom til ta úrslit, at talan var um ein lógligan borgara úr Ný Sælandi, sum væl kundi sleppa inn í Schengen økið.

Tá bretar koma beinleiðis til Føroya, skulu teir bert eyðmerkjast, eins og føroyingarnir. Hetta kemst av, at Bretland er við í Schengen, men ikki í sjálvari pass eftirlitsskipanini.

Løgreglan á flogvøllinum er væl nøgd við skipanina. Hon hevur ikki serligar eyka arbeiðsbyrðar við sær, av tí, at einki eftirlit krevst á rutunum frá Danmark, íslandi og Noreg.